## IA ikki í samgongu við Siumut

IA, sum stendur til at vinna stórsigur á grønlendska landstingsvalinum í dag, fer ikki at skipa samgongu saman við Siumut. Teir báðir flokkarnir hava samstarvað í 30 ár, men samstarvið heldur ikki fram aftan á valið. Tá fara vit heldur í andstøðu, segði formaðurin í IA, Kupik Kleist, við grønlendska kringvarpið KNR í gjár. Kupik Kleist segði, at í valstríðnum hevur Siumut givið veljarunum fleiri lyfti, sum tað ikki ber til at halda, og tí hevur flokkurin rikið eitt óveruligt valstríð og lagt upp til ein óveruligan politikk, segði hann. Sambært teirri seinastu kanningini kann IA fáa heili 44 prosent av atkvøðunum í dag



## Dalai Lama í Íslandi

Útlagni, andaligi leiðarin hjá fólkinum í Tibet, Dalai Lama, kom til Reykjavíkar um vikuskiftið. Í gjár helt hann sokallaðan friðarfund í teirri stóru Hallggrímskirkjuni, og millum teirra, sum sótu í kirkjuni, vóru tveir ráðharrar, men hvørki forsætis- ella uttanríkisráðharrin. Tey, sum hava fyrireikað vitjanina hjá Dalai Lama, hava biðið um fund við Jóhonu Sigurðardóttur, forsætisráðharra, men ikki fingið svar, skrivar Morgunblaðið. Dalai Lama skal kortini hitta Ögmund Jónasson, heilsumálaráðharra í dag, og hann skal eisini vitja Altingið og tess uttanríkisnevnd.

# Havnin í fokus

**Tórshavnar kommuna spílar seg út, nú hon fyllir 100 ár, og kunngjørdi hon í morgun longstu skránna fyri Mentanarnáttina higartil**

MENTAN
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*




*Havnin, sum fyllir 100 í ár, verður sett í fokus Mentanarnáttina komandi fríggjadag, og kundu fyrireikararnir bjóða longstu skrá higartil fyri Mentanarnáttina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í samband við at Tórshavnar kommuna fyllir 100 ár verður Mentanarnáttin víðka til higartil størstu skrá nakrantíð. Skráin varð kunngjørd á tíðindafundi í morgun, har luttakandi á Mentanarnáttini vóru hjástødd. Dagurin byrjar klokkan 10.00 tá túnabóltur verður í Gamla Kommunuskúlagarði við næmingum úr 6. og 7. flokki. Mentanarnáttin verður ikki sett fyrr enn klokkan 18.00 um kvøldið, og tað verður fráfarandi kommunustjórin, Jens Marius Poulsen, ið fer at seta Mentanarnáttina.

Tórshavnar kommuna fyllir sum nevnt 100 ár í ár. Í tí sambandi verður nógv gjørt burturúr kunningini um 100 ára gamla býin. Rundferðir vera í gomlu Havnini og í Gamla Kirkjugarði, Ráðhúsið, Amtmansgarðurin, Tryggingarfelagið og Tórshavnar Móttøkuhús fara at hava opið, og Felagið Tórshavn skipar fyri gongutúri oman eftir Varðagøtu við frásøgufólki. Gjøgnum dagin verða framsýningar og konsertir ymsa staðni í býnum, við kendum og minni kendum listafólki. Kanska tað mest forvitnisliga við Mentanarnáttini, er tónleikaverkið 100 ár-1000 sár, sum er konsert við tungmálmsbólkinum, Sic. Bólkurin hevur fingið til uppgávu at gera tónleik til upptøku frá 1977 hjá Landsverkfrøðinginum, sum er ein biltúrur gjøgnum Havnina. Tónleikaverkið verður framført á midnátt í hølunum hjá Tjóðpalli Føroya.

Fullfiggjaða skráin er at finna á heimasíðunum: www.torshavn.fo og www.visittorshavn.fo.

Meir verður at frætta um Mentanarnáttina komandi dagarnar.



*Tungmálmsbólkurin stendur fyri tí mest spennandi í skránni. Eitt níggju minuttir langt lag er gjørt til upptøku frá 1977, sum Landsverkfrøðingurin gjørdi av einum biltúri gjøgnum Havnina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Buzz Aldrin tørvar bilar

**Upptøkurnar til filmingina av Buzz Aldrin, hvor ble det av deg i alt mylderet, nærkast. Í tí sambandi eftirlýsir filmsliðið bilar, ið eru eldri enn 10 ár**

Um ein lítlan mánað byrja upptøkurnar til filmin, sum verður bygdur á skaldsøguna, Buzz Aldrin, hvor ble det av deg i alt mylderet, eftir norðmannin, Johan Harstad. Søgan gongur fyri seg í Føroyum á summartíð, og seinastu mánaðirnar hevur javnt verið at frætt um filmin. Lýst hevur verið eftir føroyskum leikarum til onkrar av leiklutunum, og G! festivalurin hevur kunngjørt at onkrar upptøkur verða gjørdar meðan konsertir vera á sandinum í Gøtu. Nú eru tað bilar, ið mangla.

- Søgan gongur fyri seg í ár 2000. Tí tørvar okkum bilar til ymsu upptøkurnar, sum eru eldri enn frá ár 2000. Øll eru vælkomin at seta seg í samband við meg, um tey hava ein so gamlan bil, treytin er bara at bilarnir ikki eru reyðir, svartir ella hvítir, greiðir samskiparin av upptøkunum frá, Gudmund Nielsen.

Tað eru pall- og kamerafólkini, ið hava sett treytirnar viðvíkjandi litunum á bilum.

Bilarnir skulu virka sum statistar í upptøkunum, onkrir skulu standa parkeraðir í bakgrundini, og onkur skal nýtast í ferðsluni við ljóskurvarnar í Havn.

Upptøkurnar fara fram ymsa staðni í landinum, í Havn, Suðuroy, Sandi, Gøtu og við Gjógv, til dømis, og skulu bilar nýtast til upptøkur á hesum plássum. Bileigararnir mugu sjálvir flyta bilarnar til upptøkuplássini.

Fyrstu upp verða 20. juni umborð á Norrønu, og halda upptøkurnar fram til 1. august.

Tey, ið hava ein bil, sum er umleið 10 ára gamal, og kundu hugsað sær at latið bilin verið ein part av filminum um Buzz Aldrin, kunnu seta seg í samband við Gudmund Nielsen á buzzbilar@gmail.com.



*Ein av upptøkunum verða gjørdar við ljóskurvarnar í Bøkjarabrekku*

*Savnsmynd*